Myndir av fiskimonnum:

# Maria Olsen á Sjöhistoriska



*Fremst til vinstru síggjast Mats Wallenius, stjóri fyri Föreningen Norden i Sverige, og Nanna Hermansson, formaður í Samfundet Sverige-Färöarna.*

Ein framsýning við fotomyndum úr myndabókini Images of Fishermen eftir Mariu Olsen læt herfyri upp á Sjöhistoriska museinum í Stockholm; myndirnar skulu teir komandi 18-24 mánaðirnar sýnast í fleiri norðurlendskum museum.

Tann 27. juni læt framsýningin "Havsfiske – sex turer i Nordatlanten" upp í Sjöhistoriska Museet í Stockholm við myndum eftir svensk-føroyska fotografin Mariu Olsen. Til ferniseringina møttu eini 60 fólk, teirra millum tann danski ambassadørurin í Svøríki, Tom Risdahl Jensen, fólk frá Íslendsku Sendistovuni í svenska høvuðsstaðnum umframt onnur áhugað.



*Frá ferniseringini á Sjöhistoriska Museet; í forgrundini til högru síggjast Sören Hallberg frá Samfundet Sverige-Färöarna og keramikarin Lena Wellander práta; til vinstru tosar Nanna Hermansson við vestmenningin Tórálv Christophersen, sum hevur búð í Svöríki í nógv ár*

Fotomyndirnar á framsýningini, einar 30 í tali, eru tiknar úr myndabókini "Images of Fishermen: the North Atlantic" eftir Mariu Olsen. Myndirnar dokumentera seks fiskitúrar við føroyskum, íslendskum, grønlendskum og hetlendskum fiskiskipum og vísa gerandisdagin og arbeiðið umborð – eitt óvanligt myndaevni. Talan er um ávikavist trolveiði, garnaveiði og línuveiði eftir millum annað upsa, sild, toski og rækjum.



*Maria Olsen*

"Tað er spennandi at síggja myndirnar og hugsa sær ljóðið av maskinum og veldigum reiðskapi, og so skipið sum alla tíðina rörir seg," segði Nanna Hermansson, sum vegna Samfundet Sverige-Färöarna er stigtakari til framsýningina. "Eitt sovorðið arbeiðspláss á sjónum er nakað heilt serligt og krevur ógvuliga nógv av bæði skipara og manning. Við framsýningini vilja vit í Samfundet Sverige-Färöarna siga frá um tann týdningarmikla fiskiskapin og lívið á teimum norður atlantisku oyggjunum."

Nanna Hermansson viðmerkti víðari: "Ofta verður ídag kjakast um fiskivinnu men sjáldan verður vinnan dokumenterað. So skjótt eg sá bókina hjá Mariu hugsaði eg at hetta er sera áhugavert fyri mong. Flestu fólk kenna lítið og einki til hendan serliga heimin á sjónum. Og myndirnar eru bæði vakrar og litsterkar. Tað er stuttligt at síggja lýsingar í Tunnilbananum í Stockholm við mynd av einum toski sum kemur flúgvandi upp um lúnningina."

Framsýningin 'Havsfiske' er vorðin til í samstarvi millum Statens Maritima Museer, Samfundet Sverige-Färöarna, Samfundet Sverige-Island og Nordisk Kulturfond.

## Dagurin

**4. juli. Ulrikus**, deyður í 973. Hann var biskupur í Augsburg í 50 ár, og fyri mongu góðu gerðir sínar varð hann skírdur halgimenni í 993. Hann var annars fyrsta vesturevropeiska halgimenni, sum pávin skírdi. Týskt navn. Ul kemur av uodal, ið er sama orð sum okkara óðal, rikus merkir eyður.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Aleksandra Hammer**, ættað av Tvøroyri, búsitandi í Vági, andaðist sunnudagin á Tvøroyar sjúkrahúsi, 90 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Tvøroyar sjúkrahúsi hóskvøldi. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin klokkan 14.

**Herluf Haraldsen** andaðist týsdagin á ellisheiminum í Vágunum, 91 ára gamal. Kistan fer frá ellisheiminum hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Sandavágs Kirkju frággjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Herluf, kunnu lata ellisheiminum á Sýnini eina peningagáva, konto í peningastovnunum.

**Jónsvein Isaksen** úr Keypmannahavn fer til jarðar úr Samuelskirkjuni fríggjadagin klokkan 11:00.

**Bjarni Poulsen**, sonur Joan Poulsen, búsitandi í Haderslev, andaðist á Sønderborg Sjúkrahúsi týsdagin, 10 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14 frá Gamle Haderslev Kirke.

**Sverri Rasmussen,** vanliga nevndur Sverri hjá Skálapalla, andaðist týsdagin 91 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin klokkan 13.30. Tey, ið vilja minnast Sverra, kunnu senda Akurin eina gávu, konto í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at kæra mamma, vermóðir, omma
og langomma okkara

**Ebba Wang**
fødd Elsebeth Kristine Simonsen
í Hoyvík

doyði á Landssjúkrahúsinum mikudagin 2. juli,
93 ára gomul.
Kistan fer frá Kapellinum sunnudagin klokkan 17.
Jarðarferðin verður frá Hoyvíkar Kirkju
til kirkjugarðin í Kaldbak,
mánadagin klokkan 14.

**Eyðun, Zakarias, Sølvá, Hanus og Mourits**

Tey, ið vilja minnast Ebbu kunnu lata kirkjuni í Hoyvík gávu.
Konta í Føroya Banka og Eik.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá góða kona mín, mamma og vermamma okkara

**Tina Brattaberg**
Vágur

doyði og varð jarðað.
Takk fyri troystarrík orð, takk fyri blómur, kransar
og gávur til Vágs kirkju.
Takk fyri alla hjálp til ervið og takk til tykkum øll,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Bjarni**